# Ein rættiliga keðilig støða

**Støðan, sum fakfeløgini eru komin í, er rættiliga keðilig. Men tað mest avgerðandi í málinum, er ikki broytt**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmananfelagnum hevði ein savnandi leiklut, tá ið fakfeløgini gjørdu av at fara í eitt 24 tíma mótmælisverkfall. Hóast støðan nú er keðilig, heldur hann at tað mest umráðandi stendur eftir*

– Hetta er ein rættiliga harmilig støða. Men tað góða er, at tað, sum er mest avgerðandi, stendur framvegis við.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum var tann, sum stóð á odda fyri at sameina fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum at mótmæla at landsstýrið brúkar fútarættin at steðga ósemjum á arbeiðsmarknaðinum.

Tað endaði við, at 25 fakfeløg gjørdi av at lýsa 24 tíma arbeiðssteðg á midnátt hóskvøldið.

Men í Fimmaranum mikukvøldið umrøddi Jana H. Dalsgaard, forkvinna í felagnum føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar, ósemjuna á Landssjúkrahúsinum og tað hevur síðani fingið fleiri fakfeløg at avlýsa verkfallið aftur, tí tey siga, at tað var ein heilt greið avtala, at ósemjan um føðideildina skuldi haldast uttanfyri hetta tiltakið hjá fakfeløgunum.

Gunnleivur Dalsgarð vil ikki leggja seg út í tað, sum varð sagt í fimmaranum og hann vil heldur ikki gera viðmerkingar til ítøkiligu avgerðina hjá fleiri feløgum at avlýsa verkfallið.

– Men tað, sum er hent er ómetaliga harmiligt, tí tað fær fólk at venda eyguni skeiva vegin og at fáa málið at snúgva seg um onnur viðurskifti enn tað í veruleikanum snýr seg um.

– Vit løgdu alla tíðina dent á, at hetta hevði onki við støðuna á Landssjúkrahúsinum at gera, men nú er tað kortini blivið ein partur í málinum.

Kortini vísir Gunnleivur Dalsgarð á, at tað gleðiliga er, at kjarnin í málinum stendur eftir.

– Hetta var eitt sera einfalt mál. Tað snúði seg um at mótmæla at landsstýrið brúkar fútarættin til at loysa ósemjur á arbeiðsmarknaðinum. Og tað snúði seg um at gera tað á ein hátt sum fekk myndugleikarnar at skilja, at hetta var álvari.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at hetta er tað einasta avgerðandi í málinum og alt tað stendur rimmarfast eftir og tað er positivt.

Tað er eisini positivt, at tað eydnaðist so at siga øllum fakfeløgunum at tosa saman og koma til eina felags niðurstøðu.

Tað er eisini søguligt, at fakfeløgini boðað frá einum verkfalli meiri enn eina viku áðrenn tað verður.

Og Gunnleivur Dalsgarð leggur sær eisini í geyma, at hóast fakfeløg hava avlýst verkfallið, boða tey frá, at tey framvegis taka fult undir við mótmælinum ímóti, at landsstýrið brúkar fútarættin at steðga ósemjum á arbeiðsmarknaðinum.

– Tað hjaldi eg, at landsstýrið eigur at leggja sær í geyma, leggur hann afturat. Fer hetta at ávirka framtíðarsamstarv ímillum fakfeløgini?

– Tað havi eg onga viðmerking til. Men gott er tað ikki.

Annars sigur hann, at fráboðanin frá Starsvmannafelagnum um at fara í verkfall í 24 tímar frá á midnátt hósvøldið, stendur við.

## Fleiri feløg avlýst verkfallið

Tað var týskvøldið, at 25 fakfeløgini samdust um at fara í verkfall fyri at mótmæla at landsstýrið brúkar fútarættin at steðga ósemjum á arbeiðsmarknaðinum.

Verkfallið skuldi bara raka tann partin av virkseminum hjá hesum feløgum, sum hevði við landið at gera.

Tað var ósemjan á føðideildini, sum fekk Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar at lýsa verkfall á teimum trimum sjúkrahúsunum og á heilsuskúlanum í Suðuroy.

Hetta fekk landsstýrið at leggja málið fyri fútarættin við kravið um, at bann varð sett fyri verkfallinum og tað fekk landsstýrið viðald í.

Hetta var beinleiðis orsøkin til, at fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum samdust um at fara í 24 tíma verkfall frá á midnátt hóskvøldið 19. mai til á midnátt fríggjavkøldið 20. mai.

Men fakfeløgini løgdu størsta dentin, at verkfallið er eina og aleina lýst fyri at mótmæla prinsippinum í, at Lansstýrið brúkar fútarættin til at steðga eini ósemju á arbeiðsmarknaðurin.

Sostatt løgdu tey samstundis størsta dentin á, at hetta hevði onki við ósemjuna á føðideildini at gera og at tann ósemjan skuldi undir ongum umstøðum dragast uppí hetta tiltakið hjá fakfeløgunum.

Verkfallið var einans ætlað at vísa myndugleikunum, hvussu álvarsamt fakfeløgini meta tað, at landsstýrið brúkar fútarættin sum eitt arbeiðsrættarligt amboð.

Men í Fimmaranum mikudagin umrøddi forkvinnan í felagnum føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar ósemjuna á føðideildini í eini sending, sum snúði seg fútarættin sum arbeiðsrættarligt amboð.

Tað hevur fingið fleiri fakfeløg at avlýsa verkfallið aftur, tí tey siga, at hetta er brot á eina greiða avtalu ímillum fakfeløgini.

Hóast fleiri feløg hava avlýst verkfallið, standa tey fast við semjuna ímillum fakfeløgini um at mótmæla, at landsstýrið leggur arbeiðsósemjur á arbeiðsmarknaðinum.

Kortini er tað greitt, at fleiri onnur feløg standaf ast við fráboðaða verkfallið.

Tað hevur ikki eydnast at fáa orðið á Janu H. Dalsgaard, forkvinnu í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

# Hatta var ikki serliga smart

**– Eg eri ikki fegin um fleiri fakfeløg nú hava avlýst verkfallið í næstu viku, men vit kendu treytirnar, sigur formaður í Postfelagnum**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg haldi ikki, at talan var um nakað stórt brotsverk. Men tað var í øllum førum illa umhugsað.

Sunleif Højgaard, formaður í Føroya Postefelag, er harmur um støðuna, sum er íkomin ímillum fakfeløgini eftir at 25 fakfeløg týsdagin samdur sum at fara í eitt 24 tíma langt mótmælisverkfall á midnátt hóskvøldið.

Hóast fleiri feløg síðani hava avlýst verkfallið, ætlar Postfelagið at standa við semjuna, sum er gjørd- í hvussu so er sum støðan er í løtuni

– Vit hava ikki viðgjørt støðuna eftir at fleiri feløg hava avlýst verkfallið aftur, so fyribils liggur onki annað í kortunum, sigur formaðurin.

Hann ásannar kortini, at tað er ein nýggj støða, nú fleiri feløg hava avlýst verkfallið aftur og hann heldur, at verður fráfallið størri, fer Postfelagið eisini at umhugsa sína støðu. Enn er kortini ongin fundur í Postfelagnum avtalaður.

Hóast Postfelagið ikki hevur viðgjørt støðuna aftur, staðfestir Sunleif Højgaard fyri sína egnu rokning, at ein partur av grundarlagnum er dottin undan verkfallinum.

– Men mótmælið frá fakfeløgunum hevur longu tænt sínum endamáli við tað, at vit hava gjørt vart við, hvussu álvarsamt vit meta støðuna.

Orsøkin til at fleiri feløg hava avlýst verkfalli er, at forkvinnan í felagnum føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar tosaði í Fimmaranum mikudagin um stríðið á føðideildini, hóast feløgini høvdu avtalað, at tann ósemjan skuldi haldast heilt uttanfyri mótmælið hjá fakfeløgunum.

Tað vil formaðurin í Postfelagnum ikki so so nógv um.

Hann vil kortini ikki ikki siga, at tað var skeivt av forkvinnuni hjá sjúkrarøktarfrøðingunum at siga sína hugsan í Fimmaranum.

– Men tað var í hvussu so er ikki tað smartasta. Støðan á Landssjúkrahúsinum er sera spent og tí var tað betri ógjørt, leggur hann afturat.

Kortini viðurkennir Sunleif Højgaard at vit hava talurætt í Føroyum, men í hesum føri fekk tað so tær avleiðingar, sum vóru væntandi.

– Eg haldi ikki at forkvinnan í felagnum fyri sjúkrarøktarfrøðingarnir hevur forbrotið seg so ógvusliga. Men sum støðan var, gjørdust hetta ein trupulleiki og tað var ikki óvæntað, tí feløgini høvdu eina greiða semju um at ósemjan á Landssjúkrahúsinum skuldi ikki dragast upp í málið.

– Tí kendu allir partar fortreytirnar. Men eg eri harmur um, at hendan støðan er íkomin.

– Men hetta broytir kortini ikki ta støðu, at øll fakfeløgini framvegis eru púra samd um, at tey góðtaka ikki, at fútarætturin verður brúktur at steðga ósemjum á arbeiðsmarknaðinum.

Tí heitir hann staðiliga á bólkin, sum arbeiðir við tí víðkaða gerðarrættinum um at gera seg lidnan.